## Viðmerking:

# Giv Mærsk Air lov at sætte billettprisen ned

Vores danske flyselskab Mærsk Air, der har oprettet flyruten mellem Danmark og Færøerne, og fløjet mellem landene i flere årtier, skyldes stor tak for, at de nu har sat hul på at sænker priserne på ruten mellem Færøerne og kontinentet, således at billetprisen for færinger kan ligge på omtrent samme prisniveau, som i de øvrige lande i Europa. Billetpriserne på Færøerne er de højeste i verden. Det gælder sandelig også flybilletterne, der er så urimelige høje, at det for de fleste kun lader sig gøre, at rejse mellem landene et par gange om året f.eks. til jul. Påske eller i sommerferien. At det kræves nytænkning på området, har Mærsk Air indset, ved at følge med tiden, og er derfor kommet med rimelige pristilbud. Tilbage er nu, at få de almindelige biletter billigere, at de lægges på et fast rimelig niveau, der gør det muligt for færinger, der læser og arbejder i udlandet, at flyve oftere mellem landene.

Det er under alle omstændigheder absurd, at fastholde himmelhøje priser, kun for at holde kunstig liv i det færøske flyselskab Atlantic Airways, der i forvejen har været en stor økonomisk belastning for det færøske samfund. Hvis Atlantic Airvays ikke tåler at vi færinger rejse for en rimelig pris, er det bedre at de lægger vingerne sammen. Selskabet har to gamle fly, og en nedslidt helikopter, alligevel har det ikke resurse at forny sig selv, til trods for, at antallet af rejsende de sidste 4 årene er det højeste i Færøernes airways historie.

Det er rimeligt, at alle færinger får lov at rejser billigt med konkurrerende flyselskaber, istedet for, at



vi med vanvittige høje priser, skal tvinges at holde et bitte flyveselskab i live.

**John S.Myllhamar**

# Tøkk frá tiltakinum Hesuferð og ein rættleiðing til Regin Eikholm

Vit skulu takka Edmundi Joensen, løgtingsmanni og formanni sambandsflokksins, fyri at hann hevur svarað okkara spurningum. Svarini tosa fyri seg sjálvi um hugsan og metingar hjá Sambandsflokkinum og tað er gott fyri orðaskiftið at tær koma fram. Eisini setur Edmund fram nakrar spurningar til Hesuferð, sum vit fara at svara í einum av fyrst komandi bløðunum.

Vit leggja samstundis til merkis, at Javnaðarflokkurin, Miðflokkurin og samgonguflokkarnir ikki hava svarað teimum spurningum, vit hava sett. Vónandi verður tað skjótt.

Inntil hesir hava svarað fara vit ikki at seta nýggjar spurningar. Hesuferð fer tó at koma við eini rættleiðing til eina meiningargrein, sum nú um dagarnar hevur verið í bløðunum.

Í grein í Dimmalætting skrivar Regin Eikholm, at ..“Í Íslandi var í 1918 og 1944 talan um næstan 100 % semju ella konsensus um loysing frá Danmark, bæði í Altinginum og millum íslendska fólkið...“ .

Móti hesum setur Regin Eikholm, „ at í 1946 tóku bert 1/3 av føroyska fólki undir við loysing“.

Vit skulu royna at gera upp atkvøðugreiðslurnar í 1918 og 1944 í Íslandi og 1946 í Føroyum á sama hátt. Vit kunnu ikki vita hvat føroyska fólkið ella íslendska fólkið hildu, men vit kunnu nágreiniliga gera upp, hvussu veljararnir atkvøddu.

Í 1918 tóku íslendingar støðu til spurningin um fullveldi við einari fólkaatkvøðu, og í 1944, aftaná 26 ára skiftistíð, tóku íslendingar støðu til spurningin um at loysa - seta tjóðveldið á stovn - við einari fólkaatkvøðu.

Í 1918 atkvøddu **40,5 %** av veljarunum í Íslandi fyri fullveldi. Í 1944, tá Ísland hevði havt 26 ára skiftistíð, atkvøddu **96,1 %** av veljarunum fyri loysing. Í 1946 atkvøddu **33 %** av veljarunum í Føroyum fyri loysing.

Leggjast má afturat, at í 1918 atkvøddu íslendingar um ein sáttmála um fullveldi, sum var gjørdur av dønum og íslendingum í felag og samtyktur á Altingi. Í 1946 atkvøddu føroyingar um 2 spurningar. Eitt stjórnartilboð, sum danska stjórnin einsamøll hevði lagt úr hondum, og stovnan av føroyska tjóðveldinum við loysing frá Danmark. Hóast hetta fekk loysingin meiriluta.

**fyri Hesuferð**
**Erla Olsen**






*Frá Sandoyar Tjóðveldisfelag:*

# Nú verður eitt vinnuráð stovnað í Sandoynni

Á fundinum um vinnuliga menning av Sandoynni, ið var mikukvøldið 31. mai, kom eitt ítøkiligt úrslt burturúr. Eftir uppskoti frá Páll á Reynatúgvu tingmanni, var breið semja um, at rættast er at samskipa vinnuligu áhugamálini í Sandoynni í eitt *vinnuráð*. Stónandi fundurin verður væntandi hildin í næstum.

Fundurin var merktur av, at allir luttakararnar høvdu hug til at hyggja frameftir, og ikki nýta tíðina til at tosa um trupulleikarnar ið hava verið í Sandoynni.

Egil Olsen (menningarstjóri, Sandoy Seafood), gjørdi eina stutta gjøgnumgongd av, hvussu fyritøka hansara hevði ment seg, síðan virksemi teirra byrjaði í 1997. Hann vísti eisini á, hvussu fiskiídnaðurin á Sandoynni kann mennast, og var serstakliga fegin um tað komandi samstarvið við LIDO Seafood í Skálavík. Egil Olsen fanst tó at myndugleikunum fyri, at ongi aliloyvi eru tillutað Sandoynni.

Ólavur Ellefsen (stjóri, VIT) greiddi frá hvat KT-vinna er. Hann vísti á, at KT kann samanberast við annan infrastruktur, sum til dømis vegir, el-megi og telefonsamband. KT gerst tí ein náttúrligur partur av øllum vinnuligum virksemi, herundir eisini fiskiídnaðinum. Skal KT-vinnan menna seg í Sandoynni, fer tað helst fyri tað mesta at snúgva seg um smáar fyritøkur, helt Ólavur Ellefsen.

Gunnar Bjarnason (landbúnaðarfrøðingur) nýtti eitt “talandi” dømi til at lýsa, hvussu lítil partur av jørðini ið hoyrir til Sandoynna, ið er góður bøur. Hann mælti staðiliga til, at hesin verður varðveiddur.

Gunnar Bjarnason helt ikki at vit nakrantíð vera før fyri at fremja eina hópframleiðslu av landbúnaðarúrdráttum í Føroyum. Hinvegin eru møguleikarnar góðir fyri, at fólk hava hetta sum ítriv - til dømis kundi meira verið gjørt við at dyrka grønmeti, tí mangastaðni í Føroyum eru nógv betri møguleikar fyri hesum, enn fólk flest geva sær far um. Annars helt hann, at skulu bóndirnar fáa skuldarsanering, skal hetta gerast undir hørðum treytum.

Linjohn Christiansen (stjóri, p/f LIDO Seafood) eftirlýsti nakrar visjónir fyri, hvussu Sandoyggin skal síggja út um 10-20 ár. Hann gjørdi eina gjøgnumgongd av, tí vinnuliga tilfeingi sum longu er í Sandoynni. Niðurstøða hansara var, at vinnulívið í oynni fyrst og fremst skal vera fiskiídnaður, meðan annað vinnuvirksemi í mesta lagi kann vera avleitt virksemi

Eins og Egil Olsen, fegnaðist Linjohn Christiansen um tað komandi samstarvið millum Sandoy Seafood og LIDO Seafood.

Magni Arge (stjóri, Atlantic Airways) vísti á, at samferðslukervið er altavgerandi - líka mikið hvat slag av vinnuligum virksemi ið tosað verður um. Hann undraðist tó yvir, at tað eru so fá føroysk fiskavirki, ið útflyta fisk loftvegis. Tað eru t.d. ógvuliga fá, ið hava havt hug at nýta tann kapasitet til farmaflutning ið Atlantic Airways kann bjóða, segði Magni Arge.

Hann gjørdi eisini nógv burturúr møguleikunum ið eru fyri ferðavinnu í Sandoynni, men legði tó dent á, hvussu neyðugt tað er at samskipa tilboðini.

Til stóra frøi fyri fundarfólkið segði Magni Arge, at hann helt tað vera neyðugt við 2 flogvøllum í Føroyum, tí tað er heilt burturvið, at tað kann taka upp til 3 dagar at koma til landið, tá illa veit við.

Umleið 80 fólk vóru á fundi, og hetta er yvir 5% av øllum íbúgvunum í Sandoynni.



# Hans David fer at lesa fyri drotningini

*Margretha drotning vitjar í Føroyum í samband við 1.000 ára haldið fyri kristanini av Føroyum. Drotningin kemur higar leygardagin og fer avstað aftur annan hvítusunnudag*

EDVARD JOENSEN

Hátíðarguðstænastan í samband við 1.000 ára haldið fyri kristniboðanini í Føroyum verður í Havnar Kirkju hvítusunnudag klokkan 11. Margretha drotning og Heindrikur prinsur vera millum gestirnar.

Annan hvítusunnudag fara drotningahjúnini til deknaguðstænastu á Kirkju, har Hans David Matras fer at lesa lestur.

Kongaligu gestirnir koma til Føroya við flogfari fyrrapartin hvítusunnuaftan. Eftir skránni, sum løgd er, skal flogfarið við teimum lenda í Vágum klokkan 11.40.

Kongaskipið Dannebrog kemur undan teimum hendanvegin og fer at liggja á Miðvági og bíða eftir teimum.



*Kongaskipið Dannebrog fer at føra kongaligu gestirnar av Miðvági til Havnar og vestur aftur, tá tey skulu avstað aftur*

Av flogvøllinum fara drotningahjúnini við fylgi umborð á Dannebrog, sum eftir ætlan loysir frá bryggju í Miðvági kl. 12.15, tá farið verður til Havnar.

Sjóverjuskipini Triton og Tjaldrið fara at fylgja Dannebrog til Havnar. Í Nólsoyarfirði fer Triton at skjóta »kongasalut«, tilsamans 27 skot.

Klokkan 14.30 leggur Dannebrog at bryggju í Havn, har almenn móttøka verður. Bæði ríkisumboðsmaðurin, løgmaður, býráðsformaðurin í Havn og Føroya biskupur fara at taka í móti teimum.

Jórunn Kallsberg, sum er abbadóttir løgmanns, fer at handa drotningini blómur, tá hon kemur í land.

Av bryggjuni verður farið út í Tinganes, har Jóannes Dalsgaard, doktari, fer at greiða frá søguni á staðnum.

Um viðrar verður gingið út í Tinganes. Annars verður koyrt. Og alt eftir veðrinum verður søguliga frágreiðingin úti ella inni.

Eftir ein steðg upp á eini trý korter í Tinganesi fer drotningin umborð aftur á Dannebrog, meðan Heindrikur prinsur fer ein túr í býin.

Prinsurin fer til gongu saman við Høgna Hoydal, varaløgmanni, heim á Bryggjubakka, har hann fer at vitja Reyða Kross Føroya.

Heindrikur prinsur er verji hjá danska Reyða Krossi, og tað er í hesum sambandi, hann vitjar føroyska felagsskapin, har Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroya fer at taka ímóti.

Vitjani hjá Reyða Krossi varir ein hálvan tíma, og sambært skránni fer Heindrikur prinsur klokkan 16.45 umborð aftur á Dannebrog.

Klokkan 18.15 fara drotningahjúnini av aftur Dannebrog og koyra niðan í Norðurlandahúsið til mentanarkvøld.

Í Norðurlandahúsinum verða tey klokkan 18.30 móttikin av Helgu Hjørvar, stjóra í Norðurlandahúsinum og Leivi Hansen, býráðsformanni í Havn.

Tá tiltakið í Norðurlandahúsinum er liðugt, verður farið umborð aftur á Dannebrog, og so er ikki meira á skránni leygardagin 10. juni, hvítusunnuaftan.

Hvítusunnudag 11. juni, sum er føðingardagur hjá Heindriki prinsi, verður hátíðarguðstænastan í Havnar Kirkju, dómkirkjuni.

Klokkan 10.45 fara drotningahjúnini av Dannebrog og koyra í kirkju.

Í Havnar Kirkju taka Bjarni Bæk, dómpróstur, og Sonja Klein, sóknarprestur ímóti teimum.

Klokkan 11.00 bygjar sjálva hátíðarguðstænastan, har hans Jacob Joensen, biskupur, fer at prædika. Undir guðstænastuni verða nógvir almennir, útlendskir gestir til staðar. Millum onnur fleiri danskir biskupar, sum fara at prædika aðrastaðni í landinum annan hvítusunnudag sum liður í 1.000 ára haldinum.

Klokkan 12.15 fara drotningahjúnini úr kirkju og umborð aftur á Dannebrog, har tey verða til klokkan fimm minuttir í eitt.

Tá fara tey niðan á Hotel Hafnia, har Hans Jacob Joensen og frúa taka í móti teimum og bjóða ábit.

Klokkan 16.00 verður aftur farið umborð á kongaskipið, har tey verða til klokkan 19.15, tá leiðin liggur niðan á Hotel Føroyar, har Anfinn Kallsberg, løgmaður og frúa taka í móti teimum.

Klokkan 19.30 er løgmaður vertur við døgurða á Hotel Føroyum. Døgurðin varðir til klokkan 23.00, tá koyrt verður oman aftur á bryggjuna, og drotningahjúnini fara umborð aftur á kongaskipið Dannebrog.

Annan hvítusunnumorgun, 12. juni, klokkan 09.45 fara drotningahjúnini við bili til tyrlupallin á Boðanesi, haðani flogið verður klokkan 10.00 við tyrluni hjá Atlantsflog út á Kirkju.

Klokkan 10.30 lendir tyrlan á Kirkju, har Zacharias Zachariasen, bygdarráðsformaður tekur ímóti.

Klokkan 11.00 verður farið í kirkju á Kirkju. Hóast landið er fult av útlendskum biskupum og øðrum prædikumonnum, fer drotningin til deknaguðstænastu í eini føroyskari bygdarkirkju.

Hans David Matras, deknur, fer at lesa lestur hendan dagin.

Eftir guðstænastuna verður flogið aftur til Havnar, har farið verður umborð á Dannebrog.

Viðrar ikki at fara til Fugloyar annan hvítusunnudag, verður í staðin farið í kirkju í Kollafirði, har Niclas Joensen, deknur, lesur lestur.

Klokkan 14.00 hevur drotningin ábit fyri serliga innbodnum gestum umborð á kongaskipinum.

Klokkan 15.30 fara gestirnir í land, og kongaskipið Dannebrog loysir og fer aftur til Miðvágs, haðani drotningahjúnini við fylgi fara á flogvøllin.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, og Vibeke Larsen, ríkisumboðsmaður, fylgja teimum avstað.

Klokkan 18.30 fer flogfarið við kongaligu gestunum úr Vágum aftur til Danmarkar.


HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| MAZDA 626 HB aut. gear | 97.000 | apr. | 1988 | 45.000,- |
| MITSUBISHI CARISMA 1,8 | 23.000 | juni | 1998 | 149.000,- |
| BMW 316 (1,6) EILER | 30.000 | juli | 1997 | 125.000,- |
| CITROËN BX 1,6 | ? | sept. | 1992 | 50.000,- |
| SUZUKI BALENO VAN | 35.000 | aug. | 1997 | 75.000,- |
| MAZDA E2200 DIESEL | 21.000 | jan. | 1998 | 129.500,- |
| FORD ESCORT DIESEL | ? | aug. | 1996 | 115.000,- |
| CITROËN BX 1,9 DIESEL | 185.000 | aug. | 1991 | 65.000,- |
| OPEL ASTRA 1,6 GLS | ? | sep. | 1995 | 114.900,- |
| CITROËN BX 1,9 DIESEL | 220.000 | | 1992 | 39.000,- |
| CITROËN ZX 1,9TD | 99.000 | apr. | 1997 | 119.000,- |
| CITROËN SAXO 1,4i | 35.000 | aug. | 1997 | 89.000,- |
| CITROËN XANTIA 1,8i 5H | 45.000 | apr. | 1995 | 110.000,- |
| CITROËN XANTIA 3,0 V6 | 34.500 | juni | 1998 | 191.000,- |
| PEUGEOT 405 | 54.000 | juni | 1996 | 139.000,- |
| TOYOTA CAMRY SCT. 2,0 AVHEINTINGAR-TILBOÐ | 160.000 | aug. | 1987 | 10.000,- |
| CITROËN BX 16TRS AVHEINTINGAR-TILBOÐ | 129.000 | okt. | 1988 | 10.000,- |
| FORD FIESTA 1,1 AVHEINTINGAR-TILBOÐ | ? | nov. | 1990 | 7.900;- |

Opið er leygardagin 10.06. frá kl. 10.00-14.00

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866


# Ferðamannaskipini koma

*Nú summarið reiðiliga er komið, koma tey fremmandu ferðamannaskipini eisini. Nógv fólk vitja á hvørjum árið við hesum skipunum, og í ár verður mett, at talið fer at seta met*

EDVARD JOENSEN

Ferðamannaskipini koma við fremmandum ferðafólkum hvørt summar. Líka víst sum flytifuglurin.

Mong eru tey í tali og ymiskt bæði av nationaliteti, útsjónd og støðd. Fleiri eru gamlir kenningar, sum vitja aftur ár um ár. Men sum vera man koma eisini nýggj, ella í hvussu er skip, sum ikki hava verið í Føroyum fyrr.

Fyrsta skipið í ár kemur hvítusunnudag. Tað er ein gamal kenningur, Explorer, sum er eitt av teimum smærru skipunum, sum plaga at vitja hendanveg.

Hinvegin eru tað ofta luksusskip við fólki, sum ikki manglar pengar.

Við Explorer hesaferð eru 100 amerikansk ferðafólk, sum fara aðrastaðni enn til Havnar, sum skipini annars mangan vitja einsamalla.

Hetta skipið skal til Vestmanna, eins og farið verður undir land í Mykinesi. Har hava teir fyri at fara inn undir bergið við fólki í smáum gummibátum. Hetta eru stórar upplivingar hjá hesum fremmandafólkunum.



Umboð hjá Explorer í Føroyum er Thor Shipping í Havn, meðan Hoyviking Tours hjá veteraninum Sigurði Simonsen í Hoyvík skipar fyri útferðunum, gjørdar verða við ferðafólkinum.